# Sigið frá um vanrøkt av hjá børnum

**Pedagogar boða ov sjáldan frá, tá illgruni er um mistrivnað.**
**– Hóast tað er torført, er tað neyðugt, vóru boðini á fundi um nýggju**

BARNAVERND
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Í harðari kapping við góðveðrið og onkra hissini fótbóltskapping í sjónvarpinum, bjóðaði Føroya Pedagogfelag til fundar í Miðlahúsinum týskvøldið, har nýggja Barnaverndarlógin var til viðgerðar. Til musikalsku tónarnar frá Brandi Enni og Heiðrunn Petersen varð fundurin spældur í gongd, og nærum fullsetti salurin lat oyrini upp fyri tyngjandi, men neyðuga evninum: At starvast við børnum og at noyðast at boða frá, tá eitt barn ikki trívist.

Tað vóru tær báðar Birita Rubekk Nielsen, sum er løgfrøðingur hjá umboðsmanninum og Anna Dam, leiðari fyri nýstovnaðu barnaverndarstovuna, sum kommunurnar hava sett á stovn, ið greiddu pedagogum og øðrum áhugaðum frá um nýggju barnaverndarlógina.

Lagt varð fyri við, at Birita greiddi frá um nýggju lógina, har endamálið er at hjálpa barninum og ikki at verja foreldrarættin. Hetta hevur grundleggjandi týdning í barnaverndararbeiðinum, og hevur mangan verið trætumálið, tá barnaverndarlógir skulu gerast av nýggjum.

### Tænasta til familjurnar

Høvuðsboðskapurin á fundinum var, at fólk, sum arbeiða við børnum, hava skyldu til at boða frá um tey varnast eitthvørt illgrunasamt, og at fráboðanarskyldan kemur fram um tagnarskylduna.

– Hetta er líka so neyðugt, sum tað er torført, vóru boðini frá Onnu Dam, sum tíverri mátti staðfesta, at pedagogar koma við færri fráboðanum enn lærarar, hóast teir hava nógv tættari samband við børnini og betur samstarv við familjurnar. Samstundis varð staðfest, at tað hevur týdning, at fakfólkini seta seg í samband við foreldrini, um tey hava illgruna um vanrøkt ella mistrivnað, so tey kunnu geva eina frágreiðing, og annars verða kunnað um, at ætlanir eru um at senda eina fráboðan til Barnaverndartænastuna.

– Sum við øllum øðrum lívsins viðurskiftum, hava fólk tað best við at verða spurd beinleiðis, í staðin fyri at farið verður afturum ryggin á teimum, segði Anna Dam. Og hon vísti á, at foreldur, sum ikki vita, hvør hevur boða frá brúka alla orkuna til at hugsa um, hvør hevur boða frá, í staðin fyri at viðurkenna trupulleikan og samstarva um at hjálpa barninum.

- Tað hevur týdning fyri okkum at fólk vita, at vit eru her fyri at hjálpa og ikki at revsa, segði Anna Dam, sum vísti á, at hetta eitt nú er orsøkin til, at tey hava valt heitið Barnaverndartænastan, so fólk kenna tað sum eina tænastu. Og hon greiddi frá, at tey næstan altíð finna eina fyriskipan, sum kann hjálpa familjuni, ið er komin illa fyri í eitt tíðarskeið, uttan at familjan noyðist at skiljast sundur. Samstundis staðfesti hon, at tað er ómetaliga sjáldan, at børn verða sett heiman med alla, og at hetta bert kemur fyri, tá mett verður, at absolutt ongin møguleiki er fyri at betra um foreldraførleikan. Eitt nú tá talan er um rúsevnismisnýtarar, sum ikki hjálpast ella menningartarnað foreldur.



*Tað hevur týdning fyri okkum at fólk vita, at vit eru her fyri at hjálpa og ikki at revsa, segði Anna Dam, leiðari fyri Barnaverndarstovu Føroyar.*

# Vælferðastørv missa prestigu

**Meðan fólkið rópar eftir meira og betri vælferð, eru tey, sum veita hesar tænasturnar, lágt í metum. Tað vísir ein donsk kanning av prestiguni hjá pedagogum, lærarum, røktarum og sosialráðgevarum.**

ARBEIÐSMARKNAÐUR
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Í kanningini, sum Ugebrevet A4 hevur staðið fyri, vísir tað seg, at útbúgvingar sum tannrøktari, bankafólk ella laborantur hava hægri status millum fólk enn t.d. lærari, pedagogur ella sosialráðgevari. Hetta órógvar politikarar og serfrøðingar, tí tað er ikki bara ein trupulleiki fyri einstaka læraran, pedagogin ella heimarøktaran, men eisini ein samfelagstrupulleiki, av tí, at tað kann gerast trupult at útvega nýggj fólk til hesi størvini. Tørvur er á arbeiðsmegi í nevndu vinnum frammanundan og triðja hvørt alment starvsfólk er farið um tey 50. Útrokningar benda á, at 220.000 fólk fara at vanta í almennum størvum yvir tey næstu 10 árini.

### Lærarar lægst í metum

Á heimasíðuni hjá Javnstøðunevndini, www.javnratt.fo, stendur, at tað vísir seg, at sjúkrasystrar kortini hava rímiliga høgan status, sum enntá er hækkandi. Sambært sjúkrasystrunum sjálvum kemst hetta av, at tær í nógv ár hava satsað miðvíst uppá at hækka professionalismuna, og at tær eru sjónligar og aggressivar í almenna kjakinum. Ringast stendur til hjá lærarunum har 56% halda, at lærararnir hava mist prestigu seinastu árini.

### Virðingin skal koma úr erva

Formaðurin í danska pedagogfelagnum, BUPL, Henning Pedersen, sigur, at ein greiður samanhangur er millum lágu prestiguna og at versnaðu umstøðurnar innan starvsøkini seinastu árini.

»Vit mugu staðfesta, at okkara starvsøki ikki hevur verið raðfest í samfelagnum. Hetta kemur serliga til sjóndar í lønarlagnum og í arbeiðsumstøðunum sum heild,« sigur Henning Pedersen.

Og hann øvundar sjúkrasystrarnar, sum hóast lága løn og kritiskt fokus á sjúkrahúsunum, njóta miðal, høga ella sera høga prestigu hjá 87 prosent av fólkinum – og omaná alt er virðingin hækkandi.

Í BUPL arbeiða tey miðvíst við at bøta um fakliga profilin, men í roynd og veru meinar formaðurin, at virðingin fyri pedagogum og hinum starvsbólkunum, sum arbeiða innan umsorganarøkið, skal koma úr erva.

»So leingi sum virðingin fyri umsorganarøkinum ikki verður raðfest hægri, fer økið at hava lága prestigu. Og so leingi, sum tey eru lágt í metum, er ongin áhugi fyri teimum politiskt. Og tá er torført at ímynda sær, at tað ber til at betra um góðskuna og at menna vælferðarskipanirnar,« sigur Henning Pedersen.

Vánaligastu skoðsmálini fáa skúlalærarar og kunnu teir eisini vænta sær størstu minkingina í virðing. Ein meiriluti á 56 prosent av fólkinum heldur, at lærarar hava mist prestigu seinastu árini. Men tað kunnu lærararnir gera nógv fyri at bøta um, heldur formaðurin fyri løn- og starvsfólkanevndirnar hjá kommununum, Mads Lebech (K):

»Eg ivist ikki í at skúlalærarar fáa hægri virðing, um fólkið kennir á sær, at teir geva tað, sum verður væntað av teimum: Hægri fakligt støði og betri PISA-úrslit. Vit skulu eisini gera nakað við arbeiðstíðina hjá fólkaskúlalærarum og gera starvið meira liðiligt, so lærarar fáa fleiri pulstímar,« sigur hann.



*Lærarar, sosialráðgevar, pedagogar og onnur, sum arbeiða innan vælferðarøkið eru lágt í metum millum danir.*